UTTAN ÚR HEIMI

## Heilivágur kann bjarga milliónum

Á hvørjum ári doyggja tríggjar milliónir fólk av malaria, men nú koma tvey nýggj sløg av heilivági, sum fara at bjarga teimum flestu sjúklingunum.

Tað eru serfrøðingar hjá Drugs for Neglected Diseases Initiative, sum hava ment nýggja heilivágin, og tað áhugaverda við honum er, at hann kostar bara helmningin av tí, sum malariaheilivágur nú kostar. Tað ger, at í framtíðini fer tað at kosta 15 krónur at lekja eitt vaksið fólk og sjey krónur at lekja eitt barn.

Felagsskapurin Læknar uttan Landamark hevur staðið fyri arbeiðinum, og felagsskapurin væntar, at tað fer at bera til at lekja 24 milliónir sjúklingar um árið við nýggja heiliváginum. 43 lond hava játtað at brúka tann nýggja heilivágin, og 15 lond hava longu tikið hann í brúk.

Malaria ger serliga um seg í londunum sunnan fyri Sahara. Læknar uttan Landamark sigur, at har doyggja tvey børn um minuttin av sjúkuni.

## Smíða bátar í Kina

Fyri tveimum árum síðani fekk norðmaðurin Jon Gjedebo eitt hugskot um at smíða smáar bátar í Kina. Eitt ár seinni var ætlanin veruleiki, og nú hevur bátasmiðjan í Shanghai smíðað fleiri bátar úr træ, plasti og glastrevju.

Henning All, sum stendur fyri tí dagliga virkseminum, sigur við Aftenposten, at kinesarar eru sera namir og arbeiðssamir. Hann vísir á, at tá norðmenn smíðaðu bátar í Eritrea í Afrika, tók tað eitt ár at smíða tann fyrsta bátin. Í Kina eydnaðist tað at smíða tíggju plastbátar eftir fýra mánaðum.

Eitt gamalt kinesiskt orðatak sigur, at gevur tú einum kinesara ein bát, sært tú ikki mannin aftur. Eftirspurningurin eftir teimum norsku bátunum hevur eisini víst seg at vera so stórur, at fyritøkan hevur verið noydd at leiga eyka høli, og nú er ætlanin at byggja eina nýggja og størri smiðju. Tað merkir eisini, at arbeiði verður til fleiri bátasmiðir afturat.

## Leita eftir neyðtøkumanni

Løgreglan í svenska býnum Umeå leitar eftir einum manni, sum verður settur í samband við fleiri neyðtøkur og neyðtøkuroyndir. Løgreglan hevur DNA-spor, sum vísa, at gerningsmaðurin er tann sami, men hon veit ikki, hvør maðurin er.

Tann ókendi brotsmaðurin gjørdi fyrstu ferð vart við seg í 1998, tá hann neyðtók eina kvinnu í býarpartinum Haga í Umeå. Tey bæði næstu árini neyðtók hann tvær kvinnur afturat nærhendis Haga, og hann verður eisini settur í samband við tríggjar miseydnaðar neyðtøkuroyndir í hesum sama tíðarskeiði. Síðani frættist ikki frá manninum fyrr enn í desember í fjør. Tá neyðtók hann aftur eina kvinnu í Umeå. Í síðstu viku vórðu tvær kvinnur álopnar í býnum, men her var kortini ikki talan um neyðtøkuroynd, og løgreglan veit heldur ikki, um talan var um neyðtøkumannin.

Løgreglan í Umeå hevur almannakunngjørt eina andlitstekning av manninum eftir frágreiðingunum hjá teimum álopnu kvinnunum, og hóast næstan 3.000 fólk hava gjørt vart við seg, veit løgreglan framvegis ikki, hvør maðurin er.

## Dýrt at flúgva fullur

Ein 40 ára gamal norskur sjómaður man iðra seg um, at hann tók í so nógv til sín umborð á einum flogfari í síðstu viku.

Maðurin var komin í land í USA og skuldi við einum flogfari úr Minneapolis til Amsterdam. Men hann var dekan ov íðin at keypa av tí váta slagnum, og tað endaði við, at fleiri av ferðafólkunum ræddust hann. Hóast fleiri ávaringar gavst maðurin ikki, og tað endaði við, at flogskiparin gjørdi av at koyra mannin úr flogfarinum, tá tað millumlendi í Goose Bay í Ný Funnalandi.

Kanadiska løgreglan tók sær av norðmanninum. Fyrradagin varð hann latin leysur, men fyrst mátti hann gjalda 60.000 krónur í bót. Flogfelagið Northwest Airlines hevði annars hótt við, at hann skuldi gjalda 120.000 krónur í bót fyri ólátaðu framferðina umborð á flogfarinum.

# Ruðuleiki undan palestinska valinum í næstu viku




*Hendan tekningin vísir, hvat Hamas heldur um ísraelska forsætisráðharra*

**Mótstøða úr Ísrael, Evropa og USA endar helst við, at Hamas vinnur palestinska valið í næstu viku. Stjórnin hevur slept endanum**

PALESTINA
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

– Eg vóni, at tað nývalda tingið megnar at leggja tað demokratiska støðið undir okkara politisku skipan, segði Rawhi Fatuh, tingformaður, tá hann endaði seinasta fundin hjá palestinska tjóðartinginum undan valinum næsta mikudag.

Fyribils er ikki nógv, sum bendir á demokratisk viðurskifti í teimum palestinsku økjunum. Í Gaza berjast vápnaðir bólkar og myndugleikarnir um valdið, og á Vestara Áarbakka hava vápnað lið eftirlitið við teimum flestu býunum. Stjórnin hjá Mahmoud Abbas, forsætisráðharra, virkar at kalla als ikki og tykist eisini hava slept endanum. Hon fær eftir øllum at døma heldur einki gjørt við kravið frá teimum vápnaðu bólkunum um, at teir útlendsku valeygleiðararnir skulu sleppa sær burtur innan valdagin.

Í hesum ruðuleika er tað ein stórur spurningur, hvønn leiklut tað komandi tingið fær, skrivar tíðindamaðurin Roger Hercz skrivar í Dagsavisen. Atfinningar úr Ísrael, Evropa og USA hava gjørt, at tann víðgongdi Hamas-flokkurin kann fáa eini 35 prosent av atkvøðunum ella kanska uppaftur meiri, tí tær útlendsku atfinningarnar hava fingið fleiri at stuðla flokkinum. Tað kann tí enda við, at Hamas verður størri enn Fatah-flokkurin hjá Mahmoud Abbas.

Innanhýsis er Hamas munandi sterkari enn Fatah, og vinnur flokkurin valið, er tað lítið hugsandi, at hann fer at gera eftir kravinum frá forsætisráðharranum um at lata vápnini frá sær. Talsmenn hjá Hamas hava longu sagt, at flokkurin fer at varðveita síni vápnaðu lið eftir valið, sama hvat úrslitið verður.

Týsdagin drupu ísraelskir hermenn ein hernaðarligan leiðara hjá Hamas í býnum Tulkarem á Vestara Áarbakka, og palestinskir eygleiðarar ávaraðu alt fyri eitt um, at álopið fer at styrkja teir víðgongdu á valdegnum.

Vinnur Hamas, er tað enn eitt tekin um, at tær víðgongdu kreftirnar eru í ferð við at taka seg fram í Miðeystri, skrivar Roger Hercz. Hann vísir á, at í Egyptalandi fekk muslimnski bróðurflokkurin, sum Hamas er sprottin av, heili 88 umboð í tingið á valinum herfyri, og at Hizbollah hevur 20 prosent av tingmanningini í Libanon. Hendan gongdin kann gera, at Vesturheimurin noyðist at endurskoða sín politikk í Miðeystri, heldur Roger Hercz.

# Fingið vitið aftur

**Randal McCloy var tann einasti, sum bleiv bjargaður upp úr kolanáminum í West Virginia 4. januar. Nú hevur hann fingið vitið aftur**

VANLUKKA
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Trettan mans vóru í náminum, tá ein spreinging stongdi teir inni um morgunin 2. januar. 40 tímar seinni eydnaðist tað bjargingarliðunum at sleppa niður til menninar. Men tá var bara tann 26 ára gamli Randal McCloy á lívi.

Síðani hevur hann ligið uttan vit á sjúkrahúsinum Ruby Momorial, men í gjár lat hann eyguni upp, skrivar AP. Sambært læknunum gjørdi hann eisini vart við seg, tá onkur nevndi hann við navni.

Læknarnir siga, at enn er ov tíðliga at siga, um Randal McCloy fær varandi mein av vanlukkuni. Teir vísa á, at tað er sjáldsamt, at nakar sleppur livandi frá so drúgvari karbonmoniksiddálking, men at teir kortini hava góðar vónir.

Vanlukkan í náminum í West Virginia fekk drúgva umrøðu. Í fyrstani segði felagið, sum eigur námið, at allir menninir vóru funnir á lívi, men fáar tímar seinni mátti felagið ásanna, at tað hevði mistikið seg, og at tólv av teimum trettan monnunum vóru deyðir.